sjónvarpsfelagið

Leygardagur 13. november

15,00 ?

19,30 **So er forfilmur**

Jens Lyn er á valdi hávafólksins, Skipper Skræk noyðist at

standa eina eldroynd og Gøg og Gokke taka til rýmingar

20,15 **TV-avísin**

20,45 **Kanalin 1. partur**

Gorm og Gregers hava aftur savnað eina rúgvu av tilfari til gaman og álvara.

Gestir í kvøld eru eitt nú danski punkbólkurin Rocazino, Hans Sølvhøj, fyrrv. aðalstjóri í Danmarks Radio, Ole Olsen og Leo Mathisen, jazzpianistur og Jesper Klein tvætlar við sinum lag

22,10 **Gentur Charlies**

Eitt innbrot hjá einum forngripaseljara leiðir tær triggjar genturnar hjá Charlie á slóðina hjá einum sera virknum brotsmanni. Tær skula m.a. finna ein frosk úr keramikki, sum varð stolin úr handlinum hjá forngripaseljaranum, sum sjálvur eisini hvørvur eftir innbrotið.

Froskurin hevur áhuga, tí í honum eru smuglaðir diamantar

23,00 **Kanalin 2. partur**

24,15 **Liðugt**

Sunnudagur 14. november

15,00 **Gudstænasta**

15,50 **Sunnudagsmatiné**

Amerikanski mezzosopranurin Frederica von Stade syngur á operapallum í Bretlandi, Fraklandi og USA. Hon syngur m.a. rokklagið hjá Joni Mitchell »Both Sides Now«

17,00 **Liðugt**

19,30 **Bavianarnir**

Ein fotografur fylgdi einum bavianfylgi í Afrika í eitt hálvt ár. Urslitið var skelkandi: hóast forboð geva ferðafólk bavianunum at eta. Hetta hevur gjørt, at apurnar ikki longur tíma at leita sær eftir føði á náttúrligan hátt. Tær eru enntá vorðnar so vandar, at fáa tær ikki tað, tær vænta at fáa, loypa tær á

19,55 **Stjørnugransking**

2.500 metrar uppi á einum fjalli í Chile er ein stjørnugranskingarstøð, har visindamenn úr øllum heiminum kanna himnahvølvið sunnan fyri Equatør.

Vit siggja gerandisdagin, ella rættari gerandisnáttina á støðini. Stjørnugransking er jú eitt náttararbeiði. Hoyra metingar um møguligt liv á øðrum klótum og um tær smáu gongustjørnurnar, asteroidurnar

20,25 **Tá bløðran brast 1 (2)**

Wall Street í New York í 1929. Partabrøv og onnur virðisskjøl hækka dag frá degi. Fólk keypa seg á húsagang, tí tey rokna við stórum vinningi. Ongin droymir um, at kreppa stendur fyri durum. Uttan ein handilsmaður.

21,35 **Laterna Magica**

Um amerikanska sjónleikaran, dansaran og sangaran Fred Astaire

23,10 **Andakt**

23,15 **Liðugt**

Mánadagur 15. november

21,10 TV-avísin og ítrótt

Gudstænastur 23. sunnudag eftir Trinitatis

Havnar kirkja: Lisbeth Michelsen
Vesturkirkjan: Kjartan Mørkøre. Talvan gongur til frama fyri Neyðhjálp fólkakirkjunnar
Kaldbak: Hans J. Joensen, altargongd
Hósvík: Martin R. Jacobsen kl. 12,00, altargongd
Fuglafjørður: Torkil Beder, altargongd
Glyvrar: Jákup Kass kl. 11,00. Talvan gongur til frama fyri Sunnudagsblaðið
Klaksvík: Niels P. Danielsen, altargongd
Mikladalur: Henning Bøgesvang
Bøur: David Johannesen
Hestur: Høgni Poulsen
Skopun: Ejvind VIlhelm, altargongd
Famien: Jónsvein Bech kl. 12,00, altargongd
Øravík: Jónsvein Bech kl. 20,00, altargongd
Leiti: Bjarni Bæk kl. 12,00, altargongd

Konfirmatión í Nólsoy

Sunnudagin kl. 11,00 hevur Axel Tórgarð gudstænastu og konfirmatión í Nólsoy.

Hesi verða konfirmerað:

Herman Joensen, Kaj Olsen, Heri Thomsen, Haldis Hansen og Laila Holm.

KFUK

I morgin kl. 16,00 verður limafundur við Maju Dalsgarð, húsmóður. (Ef.es.br. 1. kap.).

Mánakvøldið kl. 20,00 møtir unggentudeildin.

KFUM & -K

I annaðkvøld kl. 20,30 verður í KFUK almennur fundur við Hans J. Joensen, presti.

Vitjan frá Norðurlendsku sjómanskirkjuni í Suðurfraklandi.

Norea Radio Danmark

Millumbylgja 205 m (1467 kHz) kl. 19,30—19,45.

Mánadagin 15.: Møti í Sindalhøllini.

Reportasja.

Norskar sendingar eru hvønn dag kl. 17,05 og mánadag-fríggjadag eisini kl. 8,00 á stuttbylgjuni, 25 metrabandinum (11,7 mHz).

Telefonandaktin, Klaksvík

Svarar dag og nátt á tlf. 56750.

Føroya Stórlosja

Í dag kl. 15,00 hevur landsfelagsskapurin hjá goodtemplararørsluni, Føroya Stórlosja, ársfund í Gøtu.

Í kvøld stendur Losjan í Gøtu fyri veitslu í skúlanum.

Andlát

6. november andaðist Frederik Magnussen, Sandavági, 79 ára gamal.

27. oktober andaðist Sofia Elisabeth Hammer, Eiði, 82 ára gomul.

4. november andaðist Jacobina Gudmundsen, Vestmanna, 86 ára gomul.

2. november andaðist Stefan Kalsø, Syðradali, 64 ára gamal.

1. november andaðist Richard Ludvík, Fámjin, 74 ára gamal.

Læknavaktirnar

Tórshavn: Sølvi W. Olsen, tlf. 16611, leygardagin og Alvur av Kák, tlf. 12557, sunnudagin.
Eysturoyggin: Sigvald Kristiansen, tlf. 41490, leygard. og Pól Olsen, tlf. 47010, sunnud.
Norðuroyggjar: Jaspur Petersen, tlf. 56400.
Vágar: Tlf. 32413
Suðuroyggin (norður): Tlf. 71560
Suðuroyggin (suður): Tlf. 73030

Tannlæknavaktin, Tórshavn

Bráðfeingishjálp móti tannapínu fæst í dag og í morgin kl. 13,00—14,00.

Tlf. 14544.

Ein beigefarvaður
GREPA
BARNAVOGNUR
til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 15928

30. oktober fingu Maj-Britt Berg og Oddur Jacobsen, Langasandi, eina dóttur.

7. november fingu Tony Haraldsen og Bent Jacob Hansen, Havn, eina dóttur.

9. november fingu Mathilda og Hans Magnus Hansen, Søldarfirði, ein son.

Risa —

Ein maður tók soleiðis til: »Nú er bingotíð«. Hann hugsaði um lýsingarnar um risabingo.

Risabingo og mong onnur orð, sum risa — verður sett sum fyrri liður, hava verið og eru ógvuliga vanlig bæði í talu og skrift.

Vit kenna orðið risaland. Í risalandinum búðu risar, tí varð landið nevnt risaland.

Sagt verður um summar menn, at teir eru risavaksnir. Teir eru ógvuliga stórir, líkir risum. Vit eiga fleiri orð, har risa— er fyrri liðurin; men tá líkna vit ymiskt saman við risa.

Summi stór lond verða nevnd risaveldi. Tað er ikki rætt at nevna tey risaveldi; vit eiga at siga **stórveldi**, soleiðis verður eisini bæði sagt og skrivað.

Í nógvum orðum er stór— fyrri liðurin, t.d. stórmaður, stórkavi, stórlop, stórstova, stóroygdur.

Mong onnur orð ber eisini til at brúka fyri risa— t.d. **megnar—, ovur—, rimmar—.**

Í einum blaði stóð, at ein maður hevði fingið ein risalaks. Har skuldi heldur havt staðið, at hann hevði fingið ein ógvuliga stóran laks ella ovurstóran laks.

Ofta verður hugsað um tað danska orðið kæmpe—, og so verður kæmpe— umsett til risa—.

Hvussu mangan hava vit ikki sæð lýsingar um risaútsølu, risabingo?

Vit hoyra av og á, at feløg lýsa, at tey hava **stórt bingo**. Tað er at fegnast um, at soleiðis verður sagt.

Sv. T.